## Selja grønlendskan skaldskap

Fleiri forløg í USA og Kanada hava játtað at viðvirka til at breiða geva grønlendskan skaldskap út í teimum báðum londunum. Millum forløgini er tað kenda amerikanska universitetsforlagið University Press of New England. Í mai kom eitt yrkingasavn hjá Aqqaluk Lynge út á enskum máli, og hon fekk so góða móttøku, at nú er ætlanin at útgeva eina bókarøð við eldri og yngri skaldskapi, sigur KNR. Forløgini hava avtalað, at 20 bøkur verða í bókarøðini, sum skal byrja við tíðini hjá Hans Egede og enda við tí nýggjasta grønlendska skaldskapinum.



*Grønlendskar bøkur skulu seljast í USA og Kanada*
*Mynd: KNR*

## Bankastjórar verða skerdir

Teir seinastu mánaðirnar hevur amerikanska stjórnin latið stórbankanum Citygroup 45 milliardir dollarar í kreppuhjálp, men hjálpin er ikki treytaleys. Í fyrra lagið skal stjórnin eiga partabrøv fyri 20 milliardir dollarar í bankanum, og í øðrum lagi skal bankaleiðslan góðtaka nakrar broytingar. Tað merkir millum annað, at forstjórin og nevndarformaðurin missa bonus-samsýningina fyri 2008, og at loft verður lagt á allar lønir og samsýningar hjá stjórum og undirstjórum. Harafturat fáa stjórar munandi minni í fráfaringarsamsýning enn higartil, sigur CBS News.

# Friðarligt á Brandstøðini

**Sløkkiliðið í Havn var bert úti til eitt óhapp um nýggjárið, tá ein rakett festi í tekjuna á einum húsum. Og so máttu teir eisini sløkkja stóla bálið við Marknagilsvegin í gjár**

NÝTTÁRSHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Nýggjársaftan var fyrsta ferðin síðani 29. november, at sløkkiliðið varð boðsent*

Tað hevur verið stak friðarligt á Brandstøðini í Havn seinastu árini um jól- og nýggjárshøgtíðirnar. Og í ár var einki undantak í so máta. Tvær ferðir vórðu boð send eftir sløkkiliðnum, men einu ferðina náddu teir ikki avstað, áðrenn neyðboðini vórðu avblást.

Einasta útrykningin um nýggjárið var tí til eini hús í Fjalsgøtu, har ein rakett hevði fest eld í takið.

- Tey hoyrdu ein brest, men góvu sær ikki far um nakað fyrr enn ein tíma seinni. Tað vísti seg, at rakettin hevði fest í og hevði brent ein ledning av, og á tann hátt varnaðust tey í húsinum eldin, sigur vakthavandi á Brandstøðini í Havn.

Hetta er fyrstu ferð, at teir av Brandstøðini vóru úti síðani 29. november.

Hin tilburðurin var á Argjum, har ein rakett eisini hevði fest í eina húsatekju. Har varnaðust fólk tað tó beinanvegin, og tey gjørdu kjótt av, smekkaðu ein stiga upp og fingu síðani sløkt eldin við einum eldssløkkjara.

### Vitjanir ávirka

Sløkkiliðið var úti í gjár aftur, men hetta var eftir áheitan frá løgregluni um at sløkkja eitt risastórt bál úti við Handilsskúlan. Talan var um eitt bál, sum varð tendrað nýggjársaftan, men sum framvegis brendi í ljósum loga seinnapartin í gjár.

- Vit sprændu eini 25 tons av vatni á, men ikki fyrr enn vit fóru við einari gravkúgv og rystu í rúgvuni, og so aftur sprændu vatn á, bar til at fáa bálið sløkt, sigur vakthavandi.

Tað tók sløkkiliðnum einar fýra-fimm tímar at sløkkja bálið.

Annars hevur sum nevnt verið ógvuliga friðarligt seinastu árini, og ein av orsøkunum, heldur vakthavandi, er, at barnagarðar gjøgnum longri tíð hava vitjað á støðini, har tey hava fingið frálæru í at ansa eftir eldi, eins og tey eru sloppin at sløkkja eld og royna bilarnar.

Hetta hevur sett síni spor hjá teimum og tey hava tikið tað við sær gjøgnum barndómin inn í vaksna lívið.

Men eisini roykvarnarar og eldssløkkjarar finnast nú í nærum hvørjum húsi, og tað merkir, at fólk hugsa meiri um eld enn tey hava gjørt.

# Tvey harðskapamál annars friðarligt

**Løgreglan í Havn hevði nógv av gera nýggjársaftan, men talan var í flestum førum um smáttaríir, sigur vakthavandi**

POLITIRAPPORTIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




Tað hevur verið eitt sindur av hjørjum, men eingin einstør stórt mál.

Tað sigur vakthavandi á politistøðini í Havn. Veðrið var av tí allarbesta, og tí var eingin ótti fyri, at vindur skuldi fara avstað við neistum og øðrum úr bálunum og gera skaða. Hinvegin var úr at gera við øðrum, fullum fólki og ófriði her og der.

Vit høvdu eisini tvey harðskapsmál. Í øðrum førinum var hetta í samband við húsaófrið, har ein varð sligin í høvdið við einari fløsku. Har verður rapport skrivað og viðkomandi helst skuldsettur. Í hinum førinum var tað ein durarvørður, sum bleiv skallaður. Har er viðkomandi handtikin og verður skuldsettur, sigur vakthavandi.

Onkur smærri ferðsluóhapp vóru, tað eina uppi við Oyggjarvegin, har tveir persónar, sum eru ov ungir at hava koyrikort, vóru í bilinum, og har eisini illgruni er um rúsdrekkakoyring.

Annars vórðu fýra onnur tikin fyri rúsdrekkakoyring, tríggir mans og ein kvinna. Í einum føri var eisini talan um koyring í frákenningartíðini og í einum øðrum føri var talan um einki koyrikort.

Nú upp undir nýggjár hevur løgreglan fram sonevnd fýrverkarí eftirlit, og tað byrjaði longu 27. desember.

Hesi eftirlit hava verið ógvuliga gjøllig, og hava eftir okkara tykki virka ógvuliga væl. Øll sølustøð eru vitjað, summi meiri enn ta einu ferðina, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

## Einki at gera

Av skaðastovuni á Landssjúkrahúsinum verður sagt, at nýggjárið hevur verið stak friðarligt.

Vit hava ongar fýrverkarískáðar havt. Tað einasta føri vit hava viðgjørt er ein eygnaskaði, verður sagt av skaðastovuni.

So nýggjárið hevur einki øðrvísið verið enn eitt vanligt vikuskifti, kanska friðarligari.

**(leo)**